## Roskilde Bank kundi á húsagang

Tann nógv størsti kundin hjá Roskilde Bank, skattasviksákærdi Kenneth Schwartz Thomsen, hevði mánadagin fund við sakføraran Michael Ziegler fyri at umrøða ein gjaldessteðg. Kenneth Schwartz Thomsen hevur ein lánikarm í Roskilode Bank upp á umleið eina milliard, og stóð á reyða listanum yvir kundar, sum ikki kundu seljast í sambandi við krakkið í summar. Tjóðbankin mátti traðka til og bjarga Roskilde Bank. Sambært Børsen kann ein gjaldssteðgur gerast veruleiki eftir fáum døgum. Men ein slíkur krevur tó góðkenning frá størstu kreditorunum hjá felagnum, Europolitan, og har er hin størsti Roskilde Bank. Enn hevur bankin tó ikki tikið støðu til, um hann vil stuðla einum gjaldssteðgi, tað gjørdi hann ikki, tá ein annar stórkundi, Steen Gude, varð kravdur á húsagang av Roskilde Bank, tí bankin hevði ikki álit á leiðsluni.



# 81 fólk hava sitið í landsstýrinum

**23 landsstýrið hava sitið í teimum 18 valskeiðunum, sum hava verið síðani vit fingu heimastýrislógina í 1948. 81 fólk hava mannað hesi landsstýri**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Síðani Føroyar fingu heimastýri í 1948 hava vit havt 23 skrásett landsstýri. Hóast vit hava havt løgtingsval 17 ferðir síðani, so eru landsstýri umskipað nakrar ferðir.

Áðrenn nýggju stýrisskipanarlógina, sum kom at virka fult út frá løgtingsvalinum í 1998, var landsstýrið eitt kollegialt stýri, sum varð valt av løgtinginum. Nú er tað løgmaður, sum verður valdur av løgtinginum, og hann tilnevnir hini landsstýrisfólkini.

Á listanum niðanfyri síggja vit, hvussu leingi hesi 81 fólkini hava sitið í landsstýrinum. Vit síggja eisini, hvussu leingi tey 11, sum hava verið løgmenn, hava sitið.

Teir fýra løgmenninir, Andrass Samuelsen, Petur Mohr Dam, Pauli Ellefsen og Edmund Joensen, hava ikki sitið sum vanligir landsstýrismenn – einans sum løgmenn.

Listin sær soleiðis út:

Samgongur síðani 1948

| | 48-50 | 50-54 | 54-58 | 58-62 | 62-66 | 66-70 | 70-74 | 74-78 | 78-80 | 80-84 | 84-88 | 88-90 | 90-94 | 94-98 | 98-02 | 2002-4 | 2004-8 | 2008-8 | 2008- |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | | A | A | | A | | | A | A | A | | A | A | A | A | A | A | A | A |
| Sambandsflokkurin | B | B | B | B | | B | B | | | B | | B | B | B | | | B | | B |
| Javnaðarflokkurin | C | | | C | | C | C | C | C | | C | | | C | | | C | | C |
| Sjálvstýrisflokkurin | D | D | | D | D | D | D | | | D | D | D | D | D | D | D | | | |
| Tjóðveldisflokkurin | | | | | E | | | E | E | | E | E | E | | E | E | | E | |
| Miðflokkurin | | | | | | | | | | | | | | | | H | | H | |
| Framburðs/Krf | | | | | Framb | | | | | | KrF | KRF | | | | | | | |
| Framsóknarflokkurin | | | | | | | | | | | FR | | | | | | | | |
| Verkamannafylkingin | | | | | | | | | | | | | | ver | | | | | |

**Løgmenn, sum ikki hava verið landsstýrismenn:**

1. Petur Mohr Dam 6
2. Pauli Ellefsen 4
3. Edmund Joensen 4
4. Andrass Samuelsen 2

**Allir løgmenn Føroya:**

1. Atli Dam 17
2. Kristian Djurhuus 10
3. Anfinn Kallsberg 6
4. Petur Mohr Dam 6
5. Jóannes Eidesgaard 4,75
6. Hákun Djurhuus 4
7. Pauli Ellefsen 4
8. Edmund Joensen 4
9. Andrass Samuelsen 2
10. Jógvan Sundstein 2
11. Marita Petersen 1,6

**Verið løgmenn + landsstýrismenn**

1. Atli Dam 17,8
2. Kristian Djurhuus 14
3. Anfinn Kallsberg 11
4. Jóannes Eidesgaard 10,75
5. Hákun Djurhuus 10
6. Jógvan Sundstein 5
7. Marita Petersen 3,6

| Landsstýrismenn | ár |
|---|---|
| 1. Jákup Lindenskov | 11 |
| 2. Niels Winther Poulsen | 8 |
| 3. Eilif Samuelsen | 8 |
| 4. Bjarni Djurholm | 8 |
| 5. Sámal Petur í Grund | 7 |
| 6. Karsten Hansen | 6,75 |
| 7. Høgni Hoydal | 6,75 |
| 8. Hákun Djurhuus | 6 |
| 9. Sámal Petersen | 6 |
| 10. Dánjal Pauli Danielsen | 6 |
| 11. Demmus Hentze | 6 |
| 12. Ivan Johannesen | 6 |
| 13. John Petersen | 6 |
| 14. Jóannes Eidesgaard | 6 |
| 15. Eyðun Elttør | 6 |
| 16. Finnbogi Ísakson | 5 |
| 17. Vilhelm Johannesen | 5 |
| 18. Olaf Olsen | 5 |
| 19. Anfinn Kallsberg | 5 |
| 20. Jóngerð Purkhús | 5 |
| 21. Hans Pauli Strøm | 4,75 |
| 22. Kristian Djurhuus | 4 |
| 23. Richard Long | 4 |
| 24. Edward Mitens | 4 |
| 25. Karsten Hoydal | 4 |
| 26. Erlendur Paturssson | 4 |
| 27. Eli Nolsøe | 4 |
| 28. Peter F. Christiansen | 4 |
| 29. Petur Reinert | 4 |
| 30. Tórbjørn Poulsen | 4 |
| 31. Páll Vang | 4 |
| 32. Niels Pauli Danielsen | 4 |
| 33. Lasse Klein | 4 |
| 34. Jógvan Djurhuus | 4 |
| 35. Thomas Arabo | 4 |
| 36. Jacob Vestergaard | 4 |
| 37. Jørgen Niclasen | 4 |
| 38. Jógvan á Lakjuni | 4 |
| 39. Bjørn Kalsø | 3,9 |
| 40. Helena Dam á Neystabø | 3,75 |
| 41. Bárður Nielsen | 3,3 |
| 42. Signar á Brunni | 3 |
| 43. Svend Aage Ellefsen | 3 |
| 44. Jógvan Sundstein | 3 |
| 45. Marita Petersen | 2 |
| 46. Jóan Petur Davicsen | 2 |
| 47. Louis Zachariassen | 2 |
| 48. Ásbjørn Joensen | 2 |
| 49. Hergeir Nielsen | 2 |
| 50. Heðin M. Klein | 2 |
| 51. Jógvan Ingvard Olsen | 2 |
| 52. Andrias Petersen | 2 |
| 53. Finnbogi Arge | 2 |
| 54. Páll á Reynatúgvu | 2 |
| 55. Bill Justinussen | 2 |
| 56. Jógvan við Keldu | 1,75 |
| 57. Tórbjørn Jacobsen | 1,75 |
| 58. Óli Jacobsen | 1,6 |
| 59. Kristian Magnussen | 1,5 |
| 60. Villi Sørensen | 1,2 |
| 61. Thorstein Petersen | 1 |
| 62. Ole Jacob Jensen | 1 |
| 63. Bergur Jacobsen | 1 |
| 64. Axel Nolsøe | 1 |
| 65. Óli Holm | 1 |
| 66. Annlis Bjarkhamar | 1 |
| 67. Atli Dam | 0,8 |
| 68. Karolina Petersen | 0,8 |
| 69. Bjørt Samuelsen | 0,75 |
| 70. Kristina Háfoss | 0,74 |
| 71. Magni Laksafoss | 0,7 |
| 72. Tordur Niclasen | 0,4 |
| 73. Karl Heri Joensen | 0,4 |
| 74. Annita á Fríðriksmørk | 0,25 |
| 75. Heðin Zachariassen | 0,17 |
| 76. Johan Dahl | 0,1 |
| 77. Óluva Klettskarð | 0,05 |
| Landsstýrismenn | ár |

www.listagluggin.com

**Vit sóknast eftir** verkum eftir Mykines, Reyni, Heinesen, Ruth Smith, Kamban, Glerfoss, Kampmann, Kruse, Waagstein og øðrum dygdargóðum listafólkum í samband við komandi søluframsýning.

**Frættið nærri við at seta tykkum í samband við okkum.**



Ingálvur av Reyni, 1993 - Trolaradekk, 130 x 215 cm

ART Listagluggin GALLERIE

Niels Finsensgøta 25 · Tórshavn
Tlf. 322022 · Mob. 210022
e-mail: listagluggin@hotmail.com

týsdag - fríggjadag:.......15.00 - 17.30
leygardag:......................11.00 - 14.00
Annars eftir nærri avtalu !